Summartónar aftur í luftini

Summartónar er tónleikafagnaður og fastur summargestur og hevur verið tað í mong ár. Í dag byrjar hesin tónleikafagnaður fyri 2003 og á skránni eru mangar framførslur kring landið, men eisini fyrilestrar, tónleikaverkstøð og so hittast eisini tónaskøld í eini rundferð, ið hevur heitið Komponistafundur í Nordkalotten

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen

Í mong ár hevur tónleikafagnaðurin Summartónar verið fastur gestur í Føroyum, og ein av undangongumonnunum hevur verið Kristian Blak, og so er aftur í ár. Eyðkent fyri Summartónar er, at tiltøk eru kring landið.

Konsertir eru á skránni, men eisini sonevndar workshops og fyrilestrar og eisini hittast tónaskøld. Hetta er liður í eini rundferð, har tónaskøld hittast undir heitinum Komponistafundur í Nordkalotten. Luttakarar koma úr Noreg, Svøriki, Finnlandi og Føroyum.

Byrjar í dag

Í dag, 17. juni, byrja Summartónar og so verður hildið á við konsertum og tiltøkum fram til tann 21. juni.

Byrjað verður í Listaskálanum í dag klokkan 20:00. Aslaug Vaa, Nordkalottens Kulturkomité, og Høgni Hoydal, landsstýrismaður við mentamálum, halda røður og tónleikur er sjálvandi eisini á skránni við føroyskum og vitjandi tónleikarum.

Komandi dagarnar eru so tiltøk á skránni. Millum luttakandi tónleikararnar og skøld úr Føroyum eru Jóhannes Andreasen, Andrea Heindriksdóttir, Ólavur Jacobsen, Andras Olsen, Sunleif Rasmusen, Atli Petersen, Agnar Lamhauge, Kári Bæk, Kristian Blak og Tróndur Bogason.

Nøvn úr øðrum londum eru t.d. MiN-ensemblet, Peder Riis-Jensen, Duo Gelland, Hans Erik Dahlgren, Olav Anton Thommessen, Thomas Rimul, Sigmund Lillebjreka, Sanna Ahvenjarvi, Mark Adderley, Erik Forare, Håkan Larsson, KameRana, B. Moe, B.A. Drage, Rolf L. Stensø, Jukka Ruohomaki, Torleif Torgersen.

Í ár verður kanska ikki komið eins víða um landið, sum áður, men tiltøk eru í Havn í Norðurlandahúsinum, Listaskálanum og í Havnar Kirkju og so verður eisini tónleikur at hoyra á Sandi, í Fuglafirði og í Klæmintsgjógv.

15 komponistar, eini 22 tónleikarar, ein dirigentur og 4 fyrilestrahaldarar hittast í Føroyum í hesum døgum, verður upplýst í tíðindaskrivi um Summartónar og komponistafundin.

Skøld hittast

Tónaskøldini í Nordkalotten hittast til fyrilestrar og prát og hetta gongur fyri seg í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Endamálið er, at teir siga frá royndum sínum og hoyra frá øðrum, knøta sambond og fáa íblástur í tónastarvi sínum.

Komponistafundurin hevur verið í nøkur ár frammanundan og verður lagdur í samband við tónleikatiltøk, so talan verður um at samtíðarkomponistar, tónleikarar, dirigentar og lurtarar hittast. Dentur verður í ár, eins og vanligt er, lagdur á at spæla tónleik eftir luttakandi tónaskøldini.

Summartónar eru aftur í ár í føroysku luftini og konsertir og tiltøk eru frá í dag og til tann. 21. juni við føroyskum og norðurlendskum tónum, tónleikarum og tónaskøldum.

Alt til summarið

Skal tú hava eina sláimaskinu, plenuklippara, trykkspulara, skjótistiga ella eina blandimaskinu?

- Spyr hjá okkum, her kann tú handla til tann lága prísin

Sosialurin 541800

O.K. HEILSØLA & MASKINUR
FO-430 Hvalvík · Tlf. 422394 · Fax 422395
e-mail: okhammer@post.olivant.fo

Fyll tangan – Hugsa positivt!

TÍÐINDASKRIV

Í døgunum 13., 14. & 15. mai vitjaði kendi danski mentalvenjarin Carsten Sommerskov í Føroyum, har hann helt skeið í Klaksvík, í Fuglafirði og í Havn.

Hesi skeið vórðu sera væl móttikkin, og fulteknað var nærum á øllum stoðum. Nú vitjar hann aftur í Føroyum, og heldur almenn skeið í Læraraskúlahøllini mikudagin 18. juni. Umframt hesi, heldur hann skeið fyri privatum vinnufyritøkum á túrinum.

Carsten Sommerskov er ein av kendastu undirvísarunum innan postivan hugsunnarhátt, samstarv og samskifti, ið danir eiga. Seinastu 20 árini hevur hann verið ein hin fremsti frálærari innan mentalvenjing, og verður brúktur av fleiri donskum vinnulívsfyritøkum, ið ynskja at fáa glað og positivt hugsandi starvsfólk í øllum liðum. Og hann prógvar ferð eftir ferð, at hansara teorir og virkisháttur virkar.

Og allir stovnar og allar fyritøkur hava tørv fyri starvsfólki, ið hugsa positivt. Menniskju í vøkstri skapa vøkstur, og tí ræður tað um at brúka ta biologisku telduna, heilan, á rættan hátt, til at stóra eins egna lívi. Tað er hvørki stjórin ella hjúnafelagin, ið stýriri tínum lívi – tað er bert tín egni heili, og tann háttur, tú sjálvur velur at liva, ið ávirka tín egna atburð og gerandisdag.

Framhald á síðu 33

Fyll tangan - Hugsa positivt

Nú er hann aftur her - Carsten Sommerskov - maðurin sum bergtók fleiri hundrað føroyingar við skeiðunum "Fyll tangan - hugsa positivt".

Vegna metstóra undirtøku í mai mánaði, verða tvey eyka skeið á læraraskúlanum í Havn, mikudagin 18. juni.

Dagskeiðið verður frá kl. 14.00 til 17.00 og kvøldskeiðið frá kl. 19.00 til 22.00

Avsláttur verður givin til bólkar.

Avmarkað atgongd

Hugsa positivt og meldið tykkum til á tlf 456390

Meiri vitan kann fáast á www.sommerskov.dk

Sosialurin 541800

IRIS
Box 240 · FO-700 Klaksvík
Tel 456390 og 216390 · Fax 456391
teldupostur: yngul@post.olivant.fo

HAVNAR BIO
P Tlf. 311956 P
www.bio.fo

Týsdagin 17.06. kl. 21⁰⁰ Týsdagin 17.06. kl. 23⁰⁰
Mikudagin 18.06. kl. 21⁰⁰ Mikudagin 18.06. kl. 23⁰⁰
Hósdagin 19.06. kl. 21⁰⁰ Hósdagin 19.06. kl. 23⁰⁰

Týsdagin 17.06. kl. 22¹⁵ Mikudagin 18.06. kl. 22¹⁵
Hósdagin 19.06. kl. 22¹⁵ – *Seinasta sýning*

Týsdagin 17.06. kl. 19³⁰ Mikudagin 18.06. kl. 19³⁰
Hósdagin 19.06. kl. 19³⁰ – *Seinasta sýning*

Týsdagin 17.06. kl. 19⁰⁰ Mikudagin 18.06. kl. 19⁰⁰
Hósdagin 19.06. kl. 19⁰⁰ – *Seinasta sýning*

KOMANDI FILMAR

Frumsýning
Fríggjadagin 20.06. kl. 19⁰⁰ Fríggjadagin 20.06. kl. 21¹⁵
Fríggjadagin 20.06. kl. 23³⁰

Frumsýning Fríggjadagin 20.06.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu